UTTAN ÚR HEIMI

## Arnold á odda

Ein nýggj meiningakanning, sum sjónvarpið CNN hevur gjørt, vísir, at meirilutin av veljarunum í amerikanska statinum Kalifornia vilja hava filmsleikaran Arnold Schwarzenegger til guvernør.

Tann 7. oktober skulu veljararnir í Kalifornia gera av, um verandi guvernørurin, demokraturin Gray Davis, skal halda fram, ella um onkur annar skal loysa hann av. Eftir kanningini hjá CNN siga 63 prosent, at tey vilja hava Gray Davis frá, og 40 prosent halda, at Arnold Schwarzenegger eigur at taka við eftir hann. Tað valevnið, sum fær næststørstu undirtøkuna, er verandi varaguvernørurin, Cruz Bustamente, sum fær stuðul frá 25 prosentum av teimum spurdu.

Mótstøðufólkini hjá filmaleikaranum fýlast á, at hann sýtir fyri at taka lut í politiskum kjaksendingum, og at eingin tí veit, hvønn politikk hann ætlar at reka, verður hann valdur. Eitt nú sýtti Schwarzenegger fyri at taka lut í einum kjakdysti við Gray Davis. Tann kendi sjónvarpsverturin Larry King hevði eisini boðið Schwarzenegger til eina spurnarsending, men heldur ikki her tók filmsleikarin av. Tey tíðindafólk, sum hava fingið orð á hann, siga, at hann altíð vil hava spurningarnar, áðrenn hann játtar.

## Haider missir undirtøku

Frælsisflokkurin hjá víðgongda eysturríkska høgrapolitikaranum Jørg Haider fekk ein frammaná, tá val var í tveimum landspørtum um vikuskiftið.

Val var í landspørtunum Oberøsterreich og Tyrol, og í báðum landspørtunum misti Frælsisflokkurin hjá Haider umleið helmingin av undirtøkuni, soleiðis at hann fekk níggju prosent av atkvøðunum í Oberøsterreich og átta prosent í Tyrol.

Tann stóri sigursharrin í báðum landspørtunum var tann konservativi Fólksins Flokkur. Í Oberøsterreich fekk flokkurin 44 prosent av atkvøðunum, og í Tyrol fekk hann næstan 50 prosent. Sosialdemokratarnir høvdu eisini framgongd og er næststørsti flokkurin í báðum landspørtunum.

## Verja Svalbard

Norska stjórnin samtykti seinasta fríggjadag at friða fimm øki á Svalbard afturat.

Umhvørvisráðharrin, Børge Brende, sigur, at við teirri nýggju samtyktini hevur stjórnin fylgt áheitanini frá Stórtinginum um at friða ein uppaftur størri part av Svalbard, so komandi ættarlið kunnu fáa gleði av teirri sjáldsomu náttúruni. Sambært ráðharranum hevur stjórnin lagt seg eftir at friða tey økini, sum hava serligan áhuga hjá fremmandum ferðafólki.

Talan er um øki, sum tilsamasns eru næstan 4.500 ferkilometrar til víddar. Tað svarar til átta prosent av oyggjabólkinum, og hetta er tann størsta einstaka friðingin, síðani norsku myndugleikarnir fyrstu ferð friðaðu øki á Svalbard í 1973. Við teirri nýggju friðingini eru umleið 65 prosent av Svalbard lýst sum friðað øki, skrivar VG.

## Hitler skuldi bannlýsast

Loynilig skjøl hjá Vatikaninum í Rom avdúka nú, at táverandi italski einaræðisharrin, Benito Mussolini, bað pávan lýsa týska leiðaran, Adold Hitler, í bann í 1938.

Tað er italski søgufrøðingurin Emma Fattorini, sum hevur fingið atgongd til skjølini hjá Vatikaninum, men hon dugir ikki at siga, um pávin umhugsaði at gera eftir áheitanini frá Mussolini. Emma Fattorini sigur við BBC, at Mussolini varð í øðini, tá Hitler hersetti Eysturríki í 1938, men hon heldur, at áheitanin kann eisini hava verið ein roynd hjá Mussolini at vita, um kirkjan vildi gera eftir boðum hansara.

Emma Fattorini heldur tað vera serliga áhugavert, at Mussolini sendi pávanum áheitanina, beint áðrenn Hitler kom til Rom at skriva undir samstarvssáttmálan millum Italia og Týskland. Hon heldur, at Mussolini kann hava gjørt eina roynd at styrkja sína egnu støðu og at gera Hitler veikari.

# Hon skuldi havt lívverju

*- Hevði Anna havt lívverju, var einki hent henni, sigur maður Onnu Lindh, Bo Holmberg*



**Maður Onnu Lindh, Bo Holmberg, fýlist á, at svenska trygdarløgreglan ikki lat hana hava lívverju teir seinastu dagarnar upp undir fólkaatkvøðuna um evruna.**

LINDH-MORÐIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað var í einari samrøðu við sjónvarpið TV4, at Bo Holmberg fanst at trygdarløgregluni.

- Soleiðis sum samfelagið er háttað í dag, er tað greitt, at hon skuldi havt lívverju. Hevði hon havt tað, var einki hent henni, sigur Bo Holmberg.

Leiðarin í lívverjudeildini hjá svensku trygdarløgregluni, Margareta Linderoth, vil ikki gera nakrar viðmerkingar til ábreiðslurnar frá Bo Holmberg. Hann kann venda sær til mín, sigur hon.

Ein fyrrverandi lívverji hjá trygdarløgregluni, John Erik Hahne, undrast eisini á, at Anna Lindh ikki hevði lívverju. Hann vísir á, at orðadrátturin upp undir fólkaatkvøðuna um evruna var harður, og at Anna Lindh hevði sínar avgjørdu áskoðanir.

- Eg helt, at hon hevði lívverju. Tað ivaðist eg ikki í, og eg eri vísur í, at hevði hon havt lívverjum var hon á lívi í dag, sigur John Erik Hahne við svensk bløð.

Tað er eisini komið fram, at uttanríkisráðið í Stockholm spurdi trygdartænastuna Sæo, um hon ætlaði at lata Onnu Lindh fáa lívverju teir seinastu dagarnar upp undir fólkaatkvøðuna. Men svarið frá trygdartænastuni var, at uttanríkiráðharrin var ikki í vanda.

# Leki í Hvítu Húsunum

**Ovastin í fregnartænastuni CIA er í øðini, tí onkur í Hvítu Húsunum avdúkaði navnið á einum av teimum loyniligu agentunum hjá fregnartænastuni. Agenturin er heldur ikki ikki hvør sum helst.**

NJÓSNING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Málið hevur sín uppruna í juli. Tá segði ein fyrrverandi amerikanskur sendiharri, Joseph Wilson, at stjórnin hjá George W. Bush, forseta hevði sagt ósatt við vilja, tá hon legði Irak undir at hava keypt ríkað uran úr afrikanska landinum Niger. Joseph Wilson hevði júst verið í Niger og kannað málið.

Nakrar dagar seinni avdúkaði blaðið Washington Post, at kona Joseph Wilson arbeiðir sum loyniligur agentur hjá fregnartænastuni CIA. Blaðmaðurin, sum skrivaði greinina, greiddi frá, at ta hevði hann fingið at vita frá einum høgum embætismanni í Hvítu Húsunum. Seinni hevur leiðslan í Washington Post greitt frá, at ikki færri enn seks tíðindamenn fingu somu upplýsingina úr Hvítu Húsunum. Blaðið ivast ikki í, at upplýsingin var ætlað sum hevnd aftur fyri tað, sum Joseph Wilson hevði sagt.

Hvítu Húsini hava blankt víst gitingunum aftur, men leiðslan í CIA vil hava eina frágreiðing haðani. Tað hevur stjórin, George Tenet, nú kravt.



# Byggja vardan verkstað í Sørvági

**Sørvágs Kommuna byggir hús til vardan verkstað og umlætting til fólk við breki. Bygningurin skal eftir ætlan verða klárur at taka í brúk á nýggjárinum**

AKTIVERING
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Sørvágs Kommuna hevur latið eini eldri hús taka niður mestsum øll sum tey eru og letur nú nýtt byggja aftur, ið brúkast skal til vardan verkstað og umlættingarheim fyri brekað*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Nýggjur verkstaður til rørslutarnað fólk verður bygdur í Sørvági. Í sama bygningi verður eisini innrættað umlættingarheim til eitt nú meningartarnað, sigur borgarstjórin í Sørvági, Eivin Jacobsen.

Tað var fyrrverandi bygdaráðsformaðurin í Sørvági, Petur Kruse, sum í síni tíð tók stig til, at rørslutarnað í oynni fingu innivist í skúlanum í Sørvági til ymiskt handaligt virksemi. Hetta var í eini tíð, tá pláss var tókt í skúlanum, greiðir Eivin Jacobsen frá. Men í dag eru hølisviðurskiftini ikki til, at hetta vrksemi kann halda fram har.

Sørvágs Kommuna gjørdi so av at byggja nýggj høli til hesi fólkini at arbeiða í. So á nýggjárinum fara tey at flyta í hesi nýggju hølini aðrastaðni í Sørvági.

Eivin Jacobsen greiðir frá, at Sørvágs Kommuna byggir um eini eldri hús í Sørvági, sum kommunan framman undan átti. Tey verða í grundini gjørd heilt av nýggjum, tí talan er bert um onkran vegg, sum stendur eftir, og síðan er bygt rættiliga nógv upp í av nýggjum. Takt verður av nýggjum, og alt innanveggja verður gjørt nýtt.

Eftir avtalu skal bygningurin vera klárur at taka í brúk á nýggjárinum, sigur borgarstjórin í sørvági. Hann fer tað at kosta kommununi góðan tvær milliónir krónur. Avtala er gjørd við Serforsorgina, sum varðar av teimum, ið skulu brúka húsið, um leigu, greiðir hann frá.

Talan er um eini 10 - 15 fólk úr Vágum, sum dagliga koma til tilboðið í Sørvágs Skúla. Tey fara so øll at flyta í nýggja verkstaðin, har eisini pláss er fyri fólki aðrastaðni enn úr Vágum, sigur borgarstjórin Sørvági. Tað arbeiða í løtuni tvey starvsfólk, umframt brúkararnar, á varda verkstaðnum, sum nú er í Sørvágs skúla.

Húsini eru rímiliga stór, sigur Eivin Jaobsen. Einar hávtfjórðahundrað fermetrar. Verkstaðurin verður í neðra, og í erva verður møguleiki fyri umlætting fyri eitt nú menningartarnað, sum kunnu koma har eitt vikuskifti ella so, greiðir hann frá. Eitt slíkt tilboð er í løtuni í oynni, men verður nú flutt í hesi nýggju hølini at vera.

# Avgreið sjálvur ferðseðilin heima

**Atlantsflog er farið undir nýggja tænastu, ta sonevndu Netbooking, har viðskiftafólkið kann sita heima við hús og avgreiða alt, sum hevur við ferðina at gera um egna teldu**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Atlantsflog hevur nú í eina tíð boðið ferðafólki ta sonevndu Netbooking, tænastuna.

Talan er um tænastu, har ferðafólkið um internetið sjálvt avgreiðir øll síni viðurskifti í samband við ferðina. Til ber at sita í egnari stovu nær tað skal vera á samdøgrinum og avgreiða ferðina út í heim.

Kent Christensen, sølustjóri hjá Atlantsflogi sigur, at henda tænasta ger, at Atlantsflog í grundini hevur avgreiðsluna opna 24 tímar um samdøgurðið, 365 dagar um árið. Tí umframt at keypa feðraseðilin ber til hjá fólki at fáa allar teir upplýsingar um flogferðsluna hjá felagnum, sum annars er gjørligt at fáa um telefonina.

Tú kanst umvegis telduna fáa upplýsingar um, nær og hvar flogførini flúgva. Hvar flogfarið er statt júst nú, nær tað lendir, um tað er seinkað og alt hatta har. Eisink ber til at skráseta seg til EuroBonus og slíkar skipanir.

Tú kanst keypa ferðaseðilin og gjalda við korti beinanveg, og so velur tú, um tú vilt hava ferðseðilin sendan til hús, ella um tú vilt heinta hann á flogvøllinum, áðrenn farið verður.

Tá keypst verður frá einum umboðsmanni, er avgreiðslugjaldið sett til 220,- krónur. Men um keypt verður umvegis netbooking, kostar avgreiðslan 100,- krónur, sigur Kent Christensen.

Tú kanst velja at skráseta teg í skipanini. Tá minnist skipanin aftur tað, sum hent er frammanundan við hesum ávísa kundanum.

Netbookin verður nógv nýtt aðrastaðni. Kent Christensen sigur, at Atlantsflog kanska er komið nakað seint í gongd við hesi skipanini. Men hinvegin hevur felagið so fingið eina góða skipan, sum er løtt at arbeiða við. Eisini hjá teimum, sum ikki regluliga nýta slíkar skipanir.




*Atlantsflog bjóðar nú kundunum nýggja tænastu, har opið er allar 24 timarnar í samdøgrinum*

*Mynd: Edvard Joensen*



*Sørvágs bygd er drúgv at fara um við fleiri kilometrum av kommunalum vegi, sum skulu asfalterast. Men stóra íløgan næsta ár verður dagstovnurin,sum byggjas skal*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Nógv at brúka pengar til

**Sørvágs Kommuna fer næsta ár undir bygging av nýggjum dagstovni fyri einar átta - níggju milliónir krónur**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Sørvági:**
Næsta ár fer Sørvágs Kommuna undir at byggja nýggjan dagstovn fyri einar átta- níggju milliónir krónur.

Eivin Jacobsen, borgarstjóri, sigur, at bygdarráðið hevur samtykt at fara undir ein nýggjan dagstovn, sum skal húsa umleið 80-90 børnum. Talan verður bæði um vøggustovu- og barnagarðsbørn.

Tað er arkitektavirkið West Tech í Sørvági, sum ger skitsuprojektið, ið er í gongd. Tað er sama virki, sum stóð fyri dagstovnunum í Hvalvík og í Sandavági. Hesin, sum nú verður bygdur í Sørvági, verður eitt sindur størri enn teir báðir, sigur Eivin Jacobsen.

Í løtuni verður arbeitt við ábótum ymsastaðni í bygdini, greiðir borgarstjórin frá. Sørvágur hevur nógvan kommunalan veg. Helst meira enn 10 kilometrar, so har er nógv at halda. Asfalterað hevur verið har seinastu dagarnar. Onkur gamal bygningur er tikin niður, og økið fríðkað.

Eisini á havnarlagnum eru stórarbeiði gjørd, sigur borgastjórin. Í samband við, at fiskamóttøkan og uppboðssølan hava ætlanir um at flyta í onnur høli, er ymiskt gjørt við bryggjuna, umframt annað, ið hevði verið gjørt kortini, sigur hann.